## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Jóhan Hendrik Winther Poulsen 70 ár

**Sunnudagin 20. juni fyllir Jóhan Hendrik Winther Poulsen í Kirkjubø 70 ár. Føðingardagin verður hann staddur í Reykjavík tá bókin *Mál í Mæti*, sum er útgivin í sambandi við føðingardagin, verður handað honum**



Mikudagin 9. juni fór Jóhan Hendrik Winther Poulsen við Norrönu Seyðisfjarðar. Síðan súkklaði hann eftir Suðulandinum til Reykjavíkar og var hann frammi hósdagin 17. juni.

Hann verður til Frændafundin, sum er á Háskóla Islands og í Norræna húsinum í Reykjavík dagarnar 19. og 20. juni. Fundurin er triðja hvørt ár og skiftir millum Havnina og Reykjavík.

Sunnudagin kl. 15.30 handar Anfinnur Johansen, frá Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya, Jóhan Hendriki bókina *Mál í mæti,* sum er givin út í sambandi við sjeyti ára føðingardag hansara.

Eftir fundin Frændafundin er ætlanin hjá Jóhan Hendriki at súkkla aftur til Seyðisfjarðar. Hesaferð verður tað eftir Norðurlandinum. Hann kemur heim aftur við Norrönu mikudagin 30. juni.

Jóhan Hendrik er føddur í Sumba 20. juni 1934. Foreldur hansara vóru Niels Winther Poulsen (1902-1990), ættaður úr Skopun, og Kristianna, f. Mikkelsen (1904-1985), av Tvøroyri. Faðirin var lærari í Sumba til 30. januar 1940, tá ið hann gjørdist lærari í heimbygdini Skopun.

Jóhan Hendrik gekk barnaárini í skúla í Skopun. Í 1948 fór hann til Havnar at ganga í skúla og leyk studentsprógv í 1952. Eftir tað fór hann undir hægri lestur á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, las fyrst latín og enskt eitt skifti, men skifti síðan yvir til at lesa norrøna málfrøði. Hann tók mag.art. prógv í 1966. Serritgerð hansara nevndist *Færøsk personnavneskik i fortid og nutid. Personnavneskikken i Sandoy syssel.*

Í 1960-62 las hann á lærda háskúlanum í Reykjavík. Eftir próvtøkuna arbeiddi hann eitt ár á Árnasavni í Keypmannahavn við ta norrønu orðabókina. Í 1967-68 var hann lærari í fornnorrønum og norðurlendskum málum á lærdum háskúla í Illinois í USA.

1. januar í 1968 kom hann sum leysløntur á Føroyamálsdeildina, og frá 1. januar 1972 at rokna varð hann settur í starv sum deildarstjóri, seinni fekk hann starvsheitið lektari. 7. desember 1986 varð hann av Føroya løgmanni tilnevndur professari í norðurlendskum, serliga føroyskum máli á Fróðskaparsetri Føroya. 1. september 1997 varð hann eftir umsókn loystur úr starvi við eftirløn.

Í lestrartíðini hjálpti Jóhan Hendrik Chr. Matras við útgávuni av *Føroyskari -danskari orðabók,* sum kom út í 1961 í 2. útgávu.

Í 1968 leit Føroya Fróðskaparfelag honum upp í hendur at greiða til útgávu eykabind til hesa orðabók, sum kom í 1974. Tá ið hann fór ígjøgnum stóra orðasavnið á Føroyamálsdeildini, gjørdist honum greitt, at tørvur var á at fáa svarað ótaldum spurningum um orð í savninum, skuldi tað verða møguligt at geva fullgóða lýsing av merking, nýtslu, framburði, útbreiðslu o.s.fr. Tá vóru hyggjuráðini at taka til tað, sum hann hevði lært av íslendskum orðabókarmonnum, meðan hann las í Íslandi: at nýta útvarp til at koma í samband við fólk við spurningum um orð, ið lítið var vitað um.

Hann fór undir hesar sendingar nevndar *Orðabókin* 23. oktober í 1969. Tær vóru at hoyra 14. hvønn dag um veturin, tó lógu tær niðri einstakar vetrar. Síðsta sending, sum var nr. 198 í røðini, varð send 26. apríl 1993.

Gjøgnum hesar sendingar er nógv málsligt tilfar komið undan kavi, tilfar, sum kanska annars ikki var funnið fram á, umframt nýggjar upplýsingar um orð, ið orðasavnið hevði ov lítla vitan um. Sumt av hesum tilfari kom við í Eykabindið frá 1974, meðan alt hitt kom við í *Føroysku orðabók,* sum hann var aðalritstjóri á og sum kom út 24. juli 1998. Tað var sjálv krúnan á orðabókarverki hansara.

Jóhan Hendrik er giftur við Birnu Patursson úr Kirkjubø. Tey kunnu skjótt halda sín 40 ára brúdleypsdag. Børnini hjá teimum eru: Hjørtur, Hjørdis, Teitur og Ingibjørg.

### Sitið í nógvum nevndum

Jóhan Hendrik hevur sitið í nógvum nevndum og ritstjórnum. Sum dømi kann verða nevnt, at hann sat í nevnd Fróðskaparfelagsins frá des. 1977 til des. 1992, og frá 23. til 39. bók av Fróðskaparritum var hann ein av ritstjórunum.

Hann var formaður fyri megindeildarráðnum fyri hugvísindi 1987-90 umframt limur í setursráðnum sama tíðarskeið. Hann sat sum formaður fyri Føroysku málnevndini frá tí hon varð stovnað 24. september 1985 til 1. oktober 1997. Í hesum starvi skrivaði hann øll bløðini, *Orðafar,* sum málnevndin gav út.

Hann hevur eisini verið limur í navnanevnd settari av Føroya landsstýri, sum legði fram álit í 1992, málsligur ráðgevi hjá gøtunavnanevnd Tórshavnar býráðs, limur í uppgávunevnd í føroyskum á Føroya læraraskúla umframt próvdómari við sama skúla. Formaður og nevndarlimur í Orðabókagrunninum.

Limur í stjórn Málstovu Norðurlanda (Nordisk språksekretariat), limur og varalimur í NORNA (norðurlendsk samstarvsnevnd um navnagransking), umboð fyri føroyskt mál í verkætlanini Atlas Linguarum Europæ (ALE). Haraftturat limur í fleiri útlendskum vísindafeløgum. Heiðurslimur í Magistarafelag Føroya. Í 1991 fekk hann M.A. Jacobsens heiðursløn og í 1999 sømdargávu úr Grunni Kristjans á Brekkumørk.

### Bókin »Mál í mæti«

*Mál í mæti* er savn av greinum hansara skrivaðum í eitt fjøruti ára tíðarskeið. Bókin er býtt sundur í tveir partar. Í fyrra parti eru tiknar við greinir, sum allar hava staðið á prenti áður í føroyskum og útlendskum bókum og tíðarritum. Málbúnin er føroyskur, íslendskur, danskur og enskur.

Nevnast kann, at evni í summum greinum ganga aftur. Greinirnar standa í tíðarrøð, tann fyrsta stóð í *Skírni* 1963 og tann síðsta í *Med 'bil' i Norden i 100 år* frá 2003.

Seinni partur nevnist *Orð og yrði* og fevnir um ymist tilfar, sum ber 12 yvirskriftir, 5 teirra hava ongantíð verið á prenti áður. Tað síðsta í hesum parti er eitt úrval av nýggjyrðum hansara, 500 í tali. Aftast í bókini er ritskrá Jóhan Hendriks, sum ritstjórarnir hava savnað saman, men sum tó ikki er fullfíggjað.

*Mál í mæti* er valt sum heiti á hesi bók við tí í huga, at Jóhan Hendrik nýtir og viðger móðurmálið við virðing og sóma - bæði í talu og skrift - og hann gongur á odda og stimbrar onnur at fjálga um tað, tí hjartamál hansara er av sonnum málið.

Bókin er 534 síður. Útgevarar eru Føroya Fróðskaparfelag og Jóhan Hendrik Winter Poulsen. Ritstjórar eru Anfinnur Johansen og Hans Joensen. Kápumyndina hevur Tróndur Patursson prýtt.




*Mál í mæti er savn av greinum hjá Jóhan Hendriki Winther Poulsen. Í bókini eru t.d. 500 orð og nøvn sum hann hevur gjørt. Kápumyndina hevur Tróndur Patursson prýtt. Bókin er 534 blaðsíður*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Stórur áhugi fyri róðrarheimasíðunum

**At áhugin fyri kappróðrinum er sera stórur man neyvan vera nøkur loyna. Men at áhugin eisini er brennandi í vikunum ímillum stevnurnar, vita øll kanska ikki av. Tað merkja tey bæði størstu kappróðrarfeløgini tó væl. Tey hava nevniliga hvør sína heimasíðu, sum í hesum døgum verða sera nógv vitjaðar**

KAPPRÓÐUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



Nú kappróðurin er í hæddini, eru mong ið spent fylgja við kring alt landið. Miðlarnir gera eisini nógv burturúr FM-róðrunum, við beinleiðis sendingum, nógvum myndatilfarið, greinum og flottum reportasjum.

Tað er tó av góðum grundum avmarkað hvussu nógv pláss kappróðurin fær í miðlunum, tá hesir jú eisini skulu viðgera alt annað, sum hendir í samfelagnum.

Men tað finnast aðrir møguleikar enn miðlarnir, tá tað kemur til at fregnast um kappróðrarbátar og -manningar. Fleiri og fleiri eru, ið fáa eyguni upp fyri heimasíðunum hjá størstu kappróðrarfeløgunum í landinum, Havnar Róðrarfelag og Klaksvíkar Róðrarfelag. Hesar síðurnar viðgera kappróðrar relevant evni, føra statistikk yvir róðrarnar, hava tíðindagreinar, samrøður og ikki minst nógvar og góðar myndir. Báðar síðurnar vísa myndir, sum verða tiknar av Sosialinum og feløgini taka eisini myndir sjálvi, sum tey so leggja út.

### Sera stórur áhugi

Magni Brøðraberg úr HR og Christian Eli Zachariassen úr KRF siga, at áhugin fyri síðunum er sera stórur og at hann er alsamt vaksandi.

Magni sigur, at hjá HR eru umleið 350 vitjandi um dagin. Sunnudagar og mánadagar eftir stevnu er talið tó væl hægri, tá fólk fara inn at hyggja at myndunum og úrslitunum.

– Síðani vit byrjaðu við heimasíðuni á summri í 2003, hevur áhugin verið støðugt vaksandi. Í viku 23 vóru 1000 fólk inni á síðuni, meðan talið í viku 24 var tvífaldað og sostatt komið upp á 2000 fólk um vikuna. Hesa vikuna, viku 25, vænta vit, at eini 3000 fólk hava vitjað síðuna, sigur hann.

Hjá KRF, sum hevur havt heimasíðuna síðani 2000, er áhugin somuleiðis vaksin allatíðina.

– Vit hava eini 2000 fólk inni um dagin, og eg vænti, at vit eru ímillum tíggju tær mest vitjaðu heimasíður í landinum. Metið, sum kom á Noroyðastevnu, er 2384 vitjandi innan eitt døgn. Tað er jú eitt rímuliga høgt tal, so tað má sigast, at áhugin fyri kappróðri er sera stórur, sigur Christian Eli.

Báðar síðurnar verða dagførdar hvønn dag við greinum og øðrum viðkomandi tilfarið. Báðir leggja teir eisini dent á, at teir allatíðina royna at bøta um síðunar, so tey vitjandi skulu fáa sum mest burturúr.

Eitt, sum kanska sermerkir hesar síðurnar, í mun til aðrar ítróttarsíður, er, at tær ikki bert skriva um viðurskifti í egnum felag, men tær hava báðar rættiliga nógv tilfar um manningar og bátar úr øðrum feløgum eisini. Og tað má jú sigast at vera eitt stórt pluss.

### Sakna eitt kappróðrarblað

Bæði Magni og Christian Eli halda tó, at tað við so stórum áhugaskara átti at verið meira tilfar um kappróður á marknaðinum.

– Í øllum førum tær vikurnar ímeðan FM kappinngin er í gongd, átti tað at verið meiri av kappróðrartilfari. Her í Klaksvík hava vit prátað um at fara undir at gera sjónvarp, sum so kann síggjast á netinum. T.d. kundi man gjørt stuttar samrøður við rógvarar o.t..

Men eg veit ikki hvussu tað verður við tí. Tað er so lætt at práta. Men eitt blað kundi avgjørt verið eitt realistiskt boð uppá hvat kundi verið, sigur Christian Eli.

Magni er púra samdur við hann. – Um summarið er áhugin avgjørt nóg stórur til, at eitt blað kundi komið út, sum viðgjørdi kappróður burturav. Bløðini skriva um stevnurnar, og tað er gott, men tað hendir eisini so nógv ímillum stevnurnar, sum kundi verið áhugavert at frætt um. T.d. kundi tað verið skipað sum til fótbóltsdystirnar, har tú fært eina leikskrá tá tú keypir billett. Har eru samrøður við leikarar og ymiskar greinar. Tað skuldi ikki verið so torført at gjørt í samband við kappróðurin eisini, sigur Magni at enda. Heimasíðan hjá Havnar Róðrarfelag er at finna á www.drekin.fo. Tað eru Magni Brøðraberg, Vagnur Mikkelsen og Gunnar Hansen, sum gera síðuna. Síðan hjá Klaksvíkar Róðrarfelag eitur www.krf.fo. Tað eru Christan Eli Zacariassen og Fróði Waag, sum standa aftanfyri hana.

# Ísfjall seinkar Sólborg í tvær vikur

**Manningin er send heim, og fríggjakvøldið fóru reiðarin og ein maskinsjefur yvir til Ný Foundlands at fáa í lag eina skilagóða avtalu um umvæling av skaðanum, sum skipið fekk, tá tað í nógvari toku sigldi á eitt stórt ísfjall í Ný Foundlandi**

SIGLDI Á ÍSFJALL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*:Eingin av manningini fekk mein, tá ið Sólborg hósnáttina rendi á eitt stórt ísfjall í Ný Foundlandi, og fleiri tons av ísi komu inn á dekkið. Her er skipið komið í havn í øllum góðum*

Á veg inn til Bay Roberts í Ný Foundlandi at landa hósnáttina sigldi rækjutrolarin, Sólborg, á eitt stórt ísfjall. Tað var kjaftsvart í toku, og teir høvdu einar tveir tímar eftir til lands, tá ið hendingin fór fram.

Ísfjallið var so stórt, at fleiri tons av ísi komu inn á dekkið. Skipið sigldi tó til lands við egnari hjálp og kundi byrja at landa hósdagin sum ætlað.

Petur Jacobsen, reiðari, segði við Sosialin hósdagin, at ætlanin var at bøta um skaðan, soleiðis at skipið kundi fara útaftur, tá ið liðugt var at landa tey 500 tonsini av rækjum, teir høvdu inni.

Men soleiðis verður ikki.

### Manningin heim

Manningarskifti skuldi vera í Ný Foundlandi, har nakrir mans fóru yvir og nakrir komu heim, men eftir óhappið, avgjørdi reiðaríið ikki at senda menninar yvir, fyrr enn greitt varð, hvussu umfatandi skaðin á Sólborg er.

Petur sigur, at eftir at skaðin nú er kannaður meira gjølliga, hevur reiðaríið gjørt av at senda allar menninar heim uttan tann eina, sum verður eftir har yviri.

– Ein inspektørur frá Veritas kannaði skaðan hósdagin, og líkt er ikki til, at tað loysir seg at lappa skipið aftur, tí tað verður ov dýrt.

Petur og ein maskinsjefur fóru tí yvir til Ný Foundlands fríggjakvøldið, har teir skulu finna út av, hvar frægast er at umvæla skipið.

– Vit fara at royna at fáa í lag eina skilagóða avtalu, sigur hann.

### Plátur og bond

Reiðarin veit at siga, at ein smiðja er í St. Johns, sum kann umvæla skaðan, og ein er eisini í onkrum øðrum býi nærindis, sum reiðaríið fer at tosa við.

Hann sigur, at tryggingarfelagið metir tað vera skilabest at skera alt, sum farið er, burtur og byggja hendan partin av gronini uppaftur av nýggjum.

– Buglan røkkur frá skipsdekkinum og einar tveir metrar niður. Kavari hevur verið niðri, og kanningarnar vísa, at skipið ikki hevur fingið nakran skaða undir vatnlinjuni.

Petur sigur, at bondini í tí partinum av gronini á skipinum, sum kroyst er inn, eru boygnaði, og tí er skaðin nokso umfatandi.

Spurdur, hvat er innanfyri, har gronin er kroyst, sigur hann, at her er opið rúm, og tí hevur innara skipið sum so ikki fingið annan skaða enn, at bondini eru boygnaði.

### Fjúrtan dagar

Umvælingararbeiði fer helst at taka einar fjúrtan dagar ella so.

Petur sigur, at tá ið skipið er klárt at fara til fiskiskap aftur, fara 17 mans yviraftur til Ný Foundlands, harav seks fara yviraftur, sum nú eru á veg heim.

Skipari hendan túrin var Páll Jóhan Poulsen av Strondum, og komandi túr verður Jónfríður Poulsen av Skála skipari.

Sólborg fer aftur at royna á Ný Foundlands-leiðini.